Sjálvst‡risflokkurin broytir bygna›



Sámal Petur í Grund er í løtuni forma›ur í tingbólkinum hjá Sjálvst‡risflokkinum. Á næsta landsfundi skal politiski forma›urin veljast beinlei›is

Leygardagin heldur Sjálvst‡risflokkurin eyka a›alfund í Klaksvík. Meiningin er at broyta lei›slu-bygna›in og gera yvirl‡sing um fullveldisætlanina

POLITIKKUR
John Johannessen

Tvey høvu›smál eru á skránni fyri almenna eyka-a›alfundin hjá Sjálvst‡risflokkinum leygardagin.

Fyrsta máli› er at fáa broytt lei›slubygna›in í flokkinum, solei›is at politiski framsøguma›ur floksins og forma›urin er sami persónur.

Eftir verandi skipan hevur Sjálvst‡risflokkurin ein formann í tingbólkinum og ein formann fyri landsnevndina. Forma›urin fyri landsnevndina virkar sum forma›ur fyri baklandi, me›an forma›urin í tingbólkinum er politiskur forma›ur.

Hendan skipan hevur veri› heldur ørkymlandi, tí hon hevur skapt iva um, hvør er veruligi forma›ur floksins. Flokkurin og fólk yvirhøvur hava ivast í, hvør av hesum formonnum er tann, i› alment eigur at melda út vegna flokkin.

– Vit skulu nú hava eina grei›a skipan, sum limirnir í flokkinum og fólk annars skilja, sigur Sámal Petur í Grund, forma›ur í tingbólkinum.

N‡ggja skipanin leggur upp til, at flokkurin framvegis skal hava ein politiskan formann og ein formann fyri landsnevndina. Men eftir n‡ggju skipanini skal ta› ver›a politiski forma›urin, i› er talsma›ur floksins úteftir. Forma›urin fyri landsnevndina skal taka sær av ymsum umsitingarligum uppgávum og samskipan.

Bá›ir formenninir ver›a valdir beinlei›is á hvørjum landsfundi.

Melda greitt út

Hitt máli› á dagsskránni er at gera ein grei›a yvirl‡sing um framtí›arstevnu floksins.

Fullveldismáli› fer eftir øllum at døma at fylla ein stóran part av yvirl‡singini.

– Vit fara at melda út, at vit taka fult undir vi› n‡ggju stig fyri stig loysnini, sum landsst‡ri› er vor›i› samt um vi›víkjandi fullveldismálinum, sigur Jákup Sverri Kass, tingma›ur Sjálvst‡risfloksins.

Jákup Sverri Kass vísir á, at Sjálvst‡risflokkurin er samdur um, at n‡ggja semjan er ein nógv betur lei› fram móti fullveldinum, enn upprunaliga fullveldisætlanin.

– Hetta er ein skipan, sum vit vænta fer at bera á mál eftir nøkur ár. Men vit taka ikki undir vi›, at ta› skal vera innan 2006, sum Tjó›veldisflokkurin hevur melda› út, sigur Jákup Sverri Kass.

Men Sjálvst‡risflokkurin ætlar sær eisini at taka onnur mál vi› í yvirl‡singina. Hann fer at vísa á, at fullveldismáli› hevur tiki› nógva orku frá umsitingini, og at ney›ugt er at fáa virknan politikk aftur í Føroyum, solei›is at grei› lóggáva millum anna› kann gerast fyri útlendskan kapital í Føroyskari vinnu.

– Hetta vi› kapitalinum er naka›, sum vit fara at leggja nógva orku í at fáa grei›u á, sigur Jákup Sverri Kass.

Tí›indaskriv

Ta› almenna má ra›festa útbúgvingarnar høgt

Savnsmynd

Tølini benda á, at ta› føroyska samfelagi› í ov lítlan mun ra›festir handverksútbúgvingar og ikki metir fíggjarætlanina út frá virkseminum í landinum, men út frá fíggjarætlanini undarfarin ár

Hetta skrivar Vinnuhúsi› í tí›indaskrivi, í sambandi vi›, at ta› í sí›stuni hevur veri› at hoyrt um fíggjarætlanini fyri 2001 hjá Tekniska skúla í Tórshavn, har skúlin hevur bi›i› um eina rakstrarjáttan á uml. 19 mió. frá landskassanum, me›an Undirvísingar- og mentamálast‡ri› á fíggjarlógaruppskotinum hevur tilluta› skúlanum kr. 14,3 mió. Skúlin grundgevir fíggjarætlanina vi› øktum virksemi í vinnulívinum, har virkir/handverksmeistarar taka fleiri lærlingar í læru.

Virksemi› á skúlanum fevnir um undirvísing fyri handverkslærlingar, undirvísing fyri SIT (stø›isútbúgving innan tøkni) og atstø›isútbúgvingar, skei›tænastu og rakstur av skúlaheiminum.

6 deildir

Skúlin hevur 6 lærlingadeildir, sum hava hesar lærlingaútbúgvingar: Bildeild: Bilsmi›ir, Hárfrí›kanardeild: Hárfrí›karar, Eldeild: El-innleggjarar, Smi›judeild: Rørsmi›ir, stálskipasmi›ir og plátu- og konstruktionssmi›ir, Timburdeild: Húsasmi›ir og bygningssnikkarar og Maskindeild: Maskinsmi›ir.

Í samfelagnum sum heild er virksemi økt tey seinastu árini. Lønargjaldingarnar innan ídna›, handverk og bygging eru farnar úr kr. 477,2 mío. í 1994, tá i› tær vóru uppá ta› lægsta til kr. 766,3 mió. í 1999. Hetta sæst aftur í virkseminum á skúlanum, har næmingatímar eru farnir úr 139.840 tímar í 1994 til 251.150 tímar í ár 2000.

Sum sæst á myndini fylgjast landskassastu›ul og næmingatímar so nøkulunda at fram til 1998, tá landskassastu›ulin er konstantur, me›an næmingatímar vaksa vi› umlei› 37% frá 1998 til 2000. Í sama tí›arskei›i er lønin eisini hækka›.

Tølini benda á, at ta› føroyska samfelagi› í ov lítlan mun ra›festir handverksútbúgvingar og ikki metir fíggjarætlanina út frá virkseminum í landinum, men út frá fíggjarætlanini undarfarin ár.

Hollan kunnleika

Føroya Arbei›sgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag eru av tí ásko›an, at dygdin í okkara útbúgvingum hevur stóran t‡dning fyri okkara kappingarføri. Fær ungdómur okkara ikki hollar útbúgvingar, i› standa seg millum tær fremstu í heiminum, hevur føroyskt vinnulív einki stø›i at byggja framtí› sína á. Dentur eigur at vera lagdur á útbúgvingar á einum høgum tøkniligum stø›i, sum er ájavnt ella helst betur enn ta› er í vinnulívinum. Ta› er tí sera t‡dningarmiki›, at ta› almenna ra›festir útbúgvingarnar høgt.

Ta› er eisini ásko›anin hjá Føroya Arbei›sgevarafelag/Føroya Handverksmeistarafelag, at útbúgvingarnar í stóri mun eiga at vera samskipa›ar, skrivart Vinnuhúsi›.

Sjey vilja hava vatni› í Lopra

Vinnumálast‡ri› hevur fingi› sjey umsóknir um at sleppa at gagnn‡ta reina kelduvatni› í Sumbiarbergholinum

Mynd: Álvur Haraldsen

Vinnumálast‡ri› hevur fingi› sjey umsóknir um rættin at gagnn‡ta reina vatni› úr Sumbiarbergholinum. Stø›a ver›ur tikin til umsóknirnar um ein mána›

REINT VATN
John Johannessen

Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur í vinnumálum, fer um ein mána› ella so at taka stø›u til, hvør skal fáa loyvi at gagnn‡ta reina kelduvatni› í bergholinum millum Lopra og Sumba.

Freistin at søkja um loyvi var úti 2. oktober, og inn eru komnar sjey umsóknir.

Av teimum sjey umsøkjarunum eru f‡ra, sum ætla at tappa vatni› og selja ta› sum útflutningsvøru.

Tvær umsóknir eru frá kommunum, sum ynskja at n‡ta vatni› til drekkivatn. Onnur umsóknin er frá Sumbiar Kommunu og hin frá Porkeris Kommunu.

Porkeris Kommuna hevur haft stórar trupulleikar av skitnum drekkivatni. Reinsiverki› í bygdini hevur ikki virka›, og tí hevur kommunan umhugsa› at lei›a vatn yvir fjør›in úr Lopra.

Sjeyndi umsøkjarin søkir um loyvi til at sleppa at n‡ta vatni› í sambandi vi› eina smoltstø›.

Eingin favorittur

Vinnumálast‡ri› er ikki komi› so langt í vi›ger›ini av umsóknunum, at nøkur enn hevur fingi› fyrimun.

Men Gunnar Holm Jacobsen, sum í Vinnumálast‡rinum umsitir máli› vi› vatninum í Sumbiarbergholinum, sigur, at st‡ri› í næstum fer at velja nakrar umsøkjarar burturúr. Hesir ver›a sí›ani kalla›ir inn til at grei›a vinnumálast‡rinum nærri frá ætlanum sínum.

Løgtingslógin um vatni› í Sumbiarbergholinum áleggur landsst‡rismanninum í vinnumálum at leggja dent á, at umsøkjarin hevur ney›ugan førleika at fremja ætlanina, og at vatni› ver›ur gagnn‡tt á skilabestan hátt.

Tí vil hann tryggja sær at hava so gott innlit í ætlanirnar hjá umsøkjarunum, sum gjørligt, á›renn hann tekur stø›u til, hvør skal fáa rættin til vatni›.

Møguliga tvey loyvi

Í Vinnumálast‡rinum vísa tey ikki aftur møguleikanum fyri, at tvey loyvi ver›a latin til at gagnn‡ta vatni› í Sumbiarbergholinum.

Ta› kann møguliga hugsast, at onkur av teimum, i› vil sleppa at útflyta vatni›, kann deila loyvi› vi› eina av smáu kommununum, i› vil hava vatni› til drekkivatn.

Men Gunnar Holm Jacobsen vísir á, at eingin stø›a enn er tikin, og at fleiri av umsøkjarunum hava gjørt vart vi›, at teimum n‡tist loyvi til at gagnn‡ta alt vatni›.

Javna›arflokkurin heldur til í teimum bá›um ovaru hæddunum í gomlu húsunum hjá Per Højgaard vi› Áarvegin 14 í Havn

Mynd: Jens Kristian Vang

Javna›arflokkurin fingi› høli

Í farnu viku flutti Javn›arflokkurin í høli vi› Áarvegin í Havn. Meiningin vi› hølunum er at fáa eitt virknari felagslív

POLITIKKUR
John Johannessen

Fólkaflokkurin byggir í løtuni hús uppi í Svanga í Havn og fyri stuttum flutti Javna›arflokkurin í leiga› høli vi› Áarvegin 14 í Havn.

Húsini, har Javna›arflokkurin nú heldur til, eru gomlu húsini hjá Per Højgaard, fyrrveandi stjóra á Sjómansheiminum. Javna›arflokkurin leigar tvær tær ovastu hæddirnar, me›an hadilin Sirri, sum selur klæ›i úr Føroyskari ull, heldur til í kjallarahæddini.

Fyri at lív allatí›ina skal vera í húsinum og fyri at loysa ein part av bústa›artrupulleikanum í Havn, hevur Javna›arflokkurin gjørt av, at tveir av limunum í SU, sum er ungdómsdeildin hjá Javna›arflokkinum, skulu búgva í húsinum. SU fer eisini at n‡ti hølini til fundir og ymisk onnur endamál.

Meiningin er, at Javna›arflokkurin skal halda regluligar almennar fundir í n‡ggju hølunum. Hol ver›ur sett á hetta vi› at halda regluligar café løtur hvønn leygardag millum klokkan 10 og 14 fram til b‡rá›svali›. Frá Javna›arflokkinum siga tey, at hetta er eitt framhald av væl umtóktu café løtunum, sum flokkurin helt upp til seinasta løgtingsval.